## Bretar vaksinera

Í Bretlandi eru heilsumyndugleikarnir komnir so mikið langt við fyrireikingunum til at vaksinera fólk ímóti krímsjúkuni H1N1, at ætlandi verða tey fyrstu vaksinerað í hesari vikuni. Higartil eru meiri enn 100 bretar deyðir av H1N1. Teirra millum var ein 17 ára gomul genta í Skotlandi, sum var við barn. Eins og í øðrum londum hava heilsumyndugleikarnir í Bretlandi gjørt av, at heilsuveik og fólk við varandi sjúkum skulu vaksinerast fyrst, og at aftaná koma starvsfólk í heilsuverkinum og løgregluni. Men málið hjá myndugleikunum er at vaksinera allar bretar, skrivar Reuters.



## Uppsagnir í luftini

Kreppan nívur fast hjá teimum evropeisku flogfeløgunum. Higartil í ár hava 35.000 fólk mist arbeiðið í flogferðsluni umframt onnur 60.000, sum arbeiddu hjá fyritøkum, ið veita flogferðsluni ymsar tænastur. Tað skrivar tíðindabrævið Take Off, sum hevur tølini frá evropeiska flogferðslufelagsskapin um AEA. Í fjør fluttu flogfeløgini, sum eru í AEA, 366 milliónir ferðafólk, men tey vænta, at talið í ár verður um 344 milliónir. Tað sæst eisini aftur á roknskapinum. Tey 33 feløgini, sum eru limir í AEA, fara væntandi at hava tilsamans 22 milliardir krónur í halli í ár, skrivar Take Off.

# Færri fólk til Lívsstílsstevnuna

**Fyrireikararnir eru væl nøgdar við ársins Lívsstílsstevnu, sum í ár var uppi á Hotel Føroyum. Gestirnir vóru tó færri í ár enn undanfarin ár. – Kann vera, at vit ikki leggja stevnuna í heystfrítíðini næsta ár, sigur Ása Andreasen hjá Synergi**

STEVNA
*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Undanfarin ár hevur stevnan verið í Ítróttarhøllini á Hálsi, men í ár valdi Synergi, sum skipaði fyri stevnuni, at hava stevnuna á Hotel Føroyum. Karmarnir um stevnuna vóru tískil heilt annarleiðis enn áður.

Orsøkin til, hví gestirnir vóru nakað færri í ár, vita fyriskipararnir ikki enn, men nógv var á skránni hetta vikuskifti og nógv vóru upptikin av heystslaktinum.

Hóast hetta vóru fyrilestrarnir og sofaprátini sera væl vitjað, og at hava eina pallin í einari trappu vísti seg at vera eitt gott hugskot.

- Trappan er eitt minni økið og bleiv tað ein meiri intim uppliving at sita har, greiðir Ása Andreasen frá.

### Royna zoneterapi

Nógvir handlar og viðgerðarstovur vístu fram, og bar eisini til at royna ymiskt sum zoneterapi, andlitsviðgerðir og annað.

Turid Christophersen, sum var á stevnuni við síni nýútkomnu bók "Hugnalig ítriv" var vælnøgd við stevnuna, men tíanverri vóru tað ikki nógv fólk, sum komu til hennara ítrivsskúla.

- Tað hevur verið eitt sindur trupult at fáa fólk til teir ymisku lívsstílsskúlarnar, sigur Ása Andreassen eisini.

### Stórt salongshow

Hæddarpunktið á stevnuni var sunnukvøldið tá tríggjar salongir vístu tær kulastu frisyrurnar í Føroyum. Salongirnar høvdu gjørt sær stóran ómak og gjørdist hetta eitt rættiliga forkunnugt upplivilsi hjá gestunum.



*Hesin brúðarkjólin hekk eisini í inngongini tá ein kom inn til stevnuna. Hann er nýttur einaferð og bar til at bjóða uppá hann - hægsta boðið fekk kjólan og kundi fara beinleiðis til prest*



*mótasýning - Handlarnir TouChé, Shari, Dreymar, Sonja Design, Júnik, Kallkyn og Snák vístu klæði á mótasýning sunnudagin*



*Turid Christophersen seldi sína nýútkomnu bók "Hugnaligt ítriv"*



*Hjá Wellness bar til at fáa andllitsviðgerð*



*Hjá Tomas Dam búnýti vóru tey longu komin í jólahýr*



*Glitur og glamour var at síggja í nógvum básum. Her er tað tann hjá Dreymum*